

*Dánjal mundi gingið burtur við Oliviu, ið hann ikki helt vera eitt gott skip. Í 1912 gekk Olivia burtur, og Petur, beiggi Dánjal, var einum av teimum, sum ikki bar boð í bý*



*Skipari við Grana var Jens Mortensen*

fóru inn til bóndan, teir plagdu at koma til, við kalvanum. Teir fingu eitt lamb, og ein dilk, eitt sera gott lamb, og bóndin fekk eisini eitt sindur av keks og salt. Eitt slíkt lamb var ein rættulig høgtíðsmáltíð at fáa.

Um heystið fór Dánjal við Oliviu hjá Napoleon í Dali niður at selja fiskin. Hon hevði tríggjar dammar, ið teir høvdu fiskað uppí. Í damminum var fiskurin livandi, og tá kundu hann fáa nógv betri prís.

Tá vísti tað seg, at ein planki var farin í tí eina damminum, so einans ein sera stórur toskur var eftir har. Fiskurin í hinum báðum dammunum varð seldur, og skipið fór í turrdokk, áðrenn teir komu heim. Á veg upp aftur til Føroyar var ódnarveður, og tá ið teir fingu ein serliga ringan sjógv, gekk tann ovasti plankin frá og skipið fór at leka.

Dánjal vaknaði við, at sjógvur kom í koyggjuna. Hann leyp nakin upp á dekkið í berum undirbuksum. Har sá ikki gott út. Hann legði seg á knæ og rópti til Gud um bjarging. Hesa løtuna hoyrdi eg hann fleiri ferðir tosa um.

Ein ungur drongur, sum var á hansara fyrsta túri til skip, spurdi Dánjal: "Heldur tú, at vit verða bjargaðir?" "Ja, sjálvandi, oys tú bara alt, ið tú kann," var svarið. Dánjal segði, at sjálvur trúði hann tí neyvan. Tað vísti seg, sum at tað kom líka nógvur sjógvur inn í skipið, sum teir fingu úr, hóast teir bæði pumpaðu og oystu, alt tað teir vóru mentir. Alt, sum kom fyri, meðan teir soleiðis stríddust, bleiv tveitt upp á dekkið, og líka skjótt skolaði tað fyri borð.

Í lastini høvdu teir millum annað verk til skipasmiðjuna á Skála. Skiparin Jóhannes á Bø fann fram til hendan verkin og fór at stappa í lekan. Hetta gjørdi mun, so teir umsíður fingu skipið turt. Tá ið avhasaði, hevði Dánjal eisini mist undirbuksurnar.

Einasta plagg, hann tá hevði, var eitt turriklæði, hann hevði um hálsin. Hann hevði fingið tað frá eini gentu í Norðradali, sum æt Angelika, áðrenn hann fór avstað. Helst hevur hetta verið Sanna, sum hon eisini nevndist, og sum giftist við hollendska sjómanninum Louis Apol. Turriklæðið var úr føroyskum tógvi, og tað vermdi so væl. Soleiðis stóð Dánjal og stýrdi alla náttina, líka til teir komu til Flamber Head millum Hull og Scarberoug, meðan heglingsælini gingu á alla tíðina. Skipið var illa farið, skylettið var brotið, báturin var brotnaður, skottið millum kahúttina og gongina var brotið. Botnarnir í koyggjunum vóru farnir, teir vóru útflotnaðir. Teir høvdu mist øll klæðini, eisini koyggjuklæðini. Teir komu inn leygarkvøld men kundu ikki fáa loðs. So royndu teir sjálvir at sigla inn, men blivu nakað eystarlaga á. Tískil komu teir at standa fastir í móruni.

Sunnudagin sendi umboðsmaðurin Mr. Paul sleipara eftir teimum, og teir sluppu at bryggju.

Teir fingu klæði sendandi umborð. Dánjal fekk tvær skjúrtur, buksur, undirklæði, troyggju, hosur, skógvar og ein kepp. Hann fekk eisini eitt teppi og 3 shillingar, ætlaðir til tubakkspengar. Nú fór skipið í dokk, og tað tók sína tíð, tí tað var so illa farið. Klæðini betaltu menninir ikki fyri. Úrtøkan bleiv við hesum túri um kr. 500 fyri árið.

## Kongaárið 1907

1907 var "kongaárið," tá ið kongur var á vitjan. Tá var rokan í Havnini, og ofta hevur verið tikið til, at hetta ella hitt hendi kongaárið. Á Hvítanesi lá nesið so snjóhvítt av skelsandi. Fleiri stórar jaktir sigldu millum Hvítanes og Havnina við skelsandi. Allar gøturnar í Havn vóru stroyddar við skelsandi heilt út á Skálabonk. Dánjal mintist hvussu vakurt tað var, og smáar lyktir í ymiskum litum hingu allar staðir í býnum. Tað var ein virðilig móttøka kongur fekk.

Annars var ein skemtilig hending í samband við vitjanina. Sum vant við slík høvi vóru nógv fólk, sum vildu síggja kong. Serliga trunkaðust fólk við amtmansborgina, har kongur jú kom framvið. Beint við var ein stórur køstur við loki. Fyri betur at síggja kong fór fólk uppá lokið. Tey hava verið fleiri enn gott var, tí knappliga brotnaði lokið, og fólkini fóru beint í køstin! Tey hava tó neyvan hildið tað verið stuttligt.

## Við Marshall

Hetta árið fór Dánjal við Marshall, sum Jóannes í Funningsstovu átti. Palli á Lava var skipari. Jóannes var tá um 60 ára aldur, og hann sigldi bara við um summarið. Kokkurin var av Eiði, Kristian á Mýruni, men hann fór av, tí hann skuldi taka sæti á løgtingi. Nú vóru allir á einum máli um, at Dánjal skuldi vera kokkur. Hann sigur at Marshall var eitt deiligt skip, sterkt, men tað sigldi illa.

Hann sigur, at øll tey fyrstu árini hann var til skips vóru hvørki borð ella beinkir í lugarinum. Manningin hevði sítt viðføri við í kistum, teir høvdu við sær, og so sótu teir á kistunum. Men tá ið Marshall kom, vóru borð og beinkir gjørdir, og hetta var eisini gjørt umborð á Oliviu hjá Pola í Dali. Tá máláðu teir eisini lugarið, og eisini varð málað inni i koygjunum. Tá gjørdist ljóst og nossligt, og teir hongdu sær myndir upp í koyggjunum. Teir høvdu eisini máttur á dúrkinum, og hildið tað so reint og pent.

## Dánjal giftist

Í 1911 giftist Dánjal við Inger Julionnu Mariu Joensen, ið var fødd á Sundi. Hon var vanliga kallað Inga.

Petur, elsti beiggi Dánjal, gav teimum ein neytafjórðing, eina kúgv og fóður til í brúðargávu. Petur var elstur av teimum fimm systkjunum. Tá ið pápin doyði var hann 23 ára gamal. Tá var Dánjal 12 ár. Saman við mammuni tók Petur húsið uppá seg og var yngru systkjunum í faðir stað. Petur giftist við Gretu úr Fuglafirði, og tey fingu tvær døtur. Men Peturi var ikki langt lív lagað. Bert 37 ára gamal gekk hann burtur við Oliviu í 1912. Hetta var fyrsta skipsvanlukkan í 20 øld, har øll manningin fórst.

Olivia var uppkallað eftir konu Pola, sum var donsk. Hon fór av landinum við øllum børnunum aftaná hesa vanlukku. Tey flestu endaðu so langt burtur sum í New Zealandi.

Tá ið Petur fór avstað hendan seinasta túrin, høvdu Inga og Dánjal fingið ein son, Hilmar. Petur var gubbi hansara, og hann kom inn á gólvið at siga farvæl. Hann tók sína urketu og hongdi hana um hálsin á dronginum. Sum tíðin leið bleiv urketan nakað slitin. Tá fekk Inger, dóttir Hilmar, hana gjørda um til eitt armband, og hetta eigur hon framvegis. Inger hevur annars latið fleiri av myndunum í hesi grein. Tað sama hevur Poula, dóttir Dánjal.

## Bygdi sær hús

Seinni flutti foreldrini hjá Ingu, Sigrid f. Bærentsen og Johannes Joensen, húsini av Sundi og bygdu tey upp aftur í Rættará í Havn. Johannes var framúr grótmaður.

Dánjal sigur, at verfaðurin kom niðan á Hvítanes at legði sær lag á, hvussu hann skuldi spreingja klettin, tá ið hann sjálvur bygdi sær hús. Berint, beiggi Dánjal, hjálpti honum og bar grótið til Johannes, sum lagaði grundina. Berint hevði ógvuliga góðar kreftir, og Johannes segði, at Berint var betri enn nakar krani. Hann spekkaði so grundina beinanvegin og legði so sillarnar á. Ein maður úr Kollafirði smíðaði so húsini. Hann roknaði út tilfarið, ið brúkast skuldi. Dánjal keypti alt frá Finsen, og tað kom niðan á Hvítanes við báti, og varð lagt inn í neystið. Dánjal fór so til Havnar at gjalda. Finsen sigur við hann: "Hvat við tryggingini, skulu vit ikki orðna tað beinanvegin?" Tað bleiv gjørt. Finsen man hava umboðað eina trygging. Tískil hevði Dánjal tryggjað alt, aðrenn húsini eru komin upp

## Við Grana

Aftaná fimm ár við Marshall fór Dánjal í 1912 umborð á Grana sum kokkur. Her var Jens Mortensen skipari, og Mortan á Argjum var bestamaður.

Grani var ein línubátur, sum Mortensenmenninir høvdu keypt úr Grimsby í 1902.

Í 1908 hevði Jóan Pauli Hansen, hjá Cornelius av Eiði, verið skipari. Hann hevði verið við enskum línubátum. Hetta hevur riggað væl, tí í mars mánaða hevði hann fingið 700 kalvar og 500 stórar toskar á Bill Bailey bankanum í átta dagar. Jóan Pauli skuldi føra Grana árið eftir, men hann gjørdist sjúkur og doyði bert 27 ára gamal. Hann var trúlovaður við gentu úr Hvalba.

Grani var eisini brúktur sum trolari, og hesa tíðina, Jens førdi Grana, var tað sum trolari.

Beiggin Berint var eisini við eins og Mikkjal á Hvítanesi, ættaður úr Hósvík.

Hann dugdi so væl at bøta gørn, hann hevði roynt nógv við gørnum í Sundalagnum. Tí hevur hann eisini verið góður trolmaður.

**Komandi partur**

Í komandi parti verður millum annað greitt frá, tá ið Dánjal kemur ein dag og sigur konuni, at hann fór sama dag við enskum trolara til Canada. Hann var burtur í 17 mánaðir

Sosialurin